# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Nú fái eg so loyvi at spæla, og so fáa vit at síggja, um tað verður í 3. deild ella hægri enn so*

*John Petersen, venjari hjá Skála*

# Børn og ung kappast á Svangaskarði

**Í kvøld klokkan 19.30 verður fyrsta umfarið í Grand Prix kappingini í frælsum ítrótti fyri børn og ung**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Tíðindaskriv*



*Grand Prix kappingin hjá teimum yngru er í ár víðkað, so hon nú eisini umfatar spurtir og kúlustoyt*

*mynd: treysti.fo*

Undanfarin ár hevur Grand Prix kappingin verið ein partur at rennikappingunum á summarstevnunum kring landið. Rennikappingarnar á summarstevnunum fara ivaleyst at halda fram, men fyribils verða tær ikki partur av Grand Prix. Frælsur Ítróttur Føroya hevur ístaðin valt at skipa fyri einari Grand Prix kapping fyri børn og ung á frælsum ítróttarøki. Endamálið við broytingum er at økja/vekja áhugan hjá børnum og ungum fyri frælsum ítrótti á ítróttarøkið.

Í ár umfatar Grand Prix kappingin trý umfør. Kappast verður á Svangaskarði og er kappingin nógv broytt í mun til undanfarin ár. Aldursbólkarnir eru broyttir frá at verða tríggir árgangir saman, til at vera tveir árgangir saman.

Frá at vera bert ein teinur, so eru tvær kappingargreinar komnar afturat í ár. Tað verður eisini kappast í spurti og kúlustoyti. Og tað skal finnast ein vinnari í hvørjari grein. Tvs. at í somu kapping eru tríggjar Grand Prix kappingar: spurtir, miðteinur og kúlustoyt. Tað eru møguleiki hjá hvørjum einstøkum íðkara, at royna seg í øllum trimum greinunum.

Stigagevingin er eisini broytt í mun til undanfarin ár. Frá at fáa stig fyri plasering, so verður í ár givið stig fyri úrslitið tvs. tíðina ella longdina. Tí er umráðandi at fáa eina so góða tíð sum tilber og stoyta kúluna so langt tilber. Altjóða stigatalvan hjá IAAF (Altjóða Ítróttasambandið fyri Frælsan Ítrótt) verður brúkt at geva stig eftir, og har hon ikki umfatar tær greinarnar kappast verður í, verður ein stigatalva hjá DAF nýtt.

## 43 manningar til Jóansøku

**Eins og á sundalagsstevnuni verður talan um tríggjar bátsmanningarnar til 10-mannafarsróðurin. Umframt niðanfyristandi manningar verður eisini talan um barnaróður, har átta manningar hava boðað frá luttøku. Startøðin til róðarnar er sett eftir, hvussu bátarnir stóðu seg á seinastu FM-stevnuni**

**5-mannafør, dreingir**

| | |
|---|---|
| 5 | Fípan Fagra |
| 6 | Blikur |
| 7 | Tjaldrið |
| 8 | Sílið |
| 9 | Havfrúgvin |
| 10 | Teistin |
| 11 | Jallurin |
| 12 | Jómfrúgvin |

**6-mannafør, kvinnur**

| | |
|---|---|
| 7 | Víkingur |
| 8 | Kollfirðingur |
| 9 | Jarnbardur |
| 10 | Smyril |

**5-mannafør, gentur**

| | |
|---|---|
| 6 | Teistin |
| 7 | Ørnin |
| 8 | Tambar |
| 9 | Hvassi |
| 10 | Drekin |
| 11 | Blikur |

**5-mannafør, kvinnur**

| | |
|---|---|
| 5 | Erla Kongsdóttir |
| 6 | Teistin |
| 7 | Ørnin |
| 8 | Fípan Fagra |
| 9 | Frúgvin |
| 10 | Sílið |
| 11 | Ritan |
| 12 | Jallurin |
| 13 | Blikur |

**6-mannafør, menn**

| | |
|---|---|
| 5 | Riddarin |
| 6 | Lómur |
| 7 | Jarnbardur |
| 8 | Sundabáturin |
| 9 | Tvørábáturin |
| 10 | Strálan |
| 11 | Sølmundur |
| 12 | Rádni |

**8-mannafør**

| | |
|---|---|
| 7 | Knørrur |
| 8 | Argjabáturin |
| 9 | Heiðabáturin |
| 10 | Ørvur |
| 11 | Árnfirðingur |

**10-mannafør**

| | |
|---|---|
| 8 | Vestmenningur |
| 9 | Eysturoyingur |
| 10 | Havnarbáturin |



# EB/Streymur dubbar seg

**Tað tykist mest sum víst, at ein pólverskur miðvallari kemur til felagið. Og eisini verður leitað eftir styrki til álopið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir øllum at døma vil leiðslan í EB/Streymi ikki renna seg í somu støðu, sum í fjør, tá liðið misti ondina heilt móti kappingarenda. Undan árinum varð hópurin nakað styrktur, og hetta arbeiðið tykist halda fram, nú flytingarvindeygað er opnað.

Enn eru eingi almenn boð komin úr felagnum, og Rólan Højsted, formaður, sigur, at teir enn ikki hava nakað ítøkiligt at siga. Men sum skilst, so kemur ein pólverskur miðvallari til landið í komandi viku.

Talan er um ein 31 ára gamlan miðvallara, sum hevur spælt fleiri enn 200 dystir í bestu pólversku deildini. Bæði Piotr Krakowski og Rafal Kwiecinski hava, sum skilst, viðmælt, at hesin verður knýttur at hópinum, og skal metast eftir royndunum, so er lítið at ivast í, at talan er um sterkan spælara.

Hartil sigst felagið eisini leita eftir styrki til álopssessirnar. Har hevur felagið verið skert í ár, tá fyrst Arnbjørn T. Hansen og síðani Sorin Anghel hava havt drúgvar skaðasteðgir. Enn er liðið tó partur av avgjørda oddinum, og kunnu teir gerast enn sterkari seinna partin av kappingini, so kann væl vera, at fólk á sundalagsleiðini aftur í ár fara at droyma heitar dreymar um FM-gullið.